# Nýggja leiðin er rættur sjálvstýrispolitikkur

**– Mín fatan er, at nýggja leiðin, sum samgongan hevur sett út í kortið, kemst ikki nærri røttum Sjálvstýrispolitikki, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna. Hilmar Kass, fyrrverandi løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins, heldur hinvegin, at samgongan hevur givið dønum góð kort í hondina við at útskriva fólkaatkvøðu**

ALMENNUR FUNDUR
*Stefan í Skorini*

Týsdagin skipaði Sjálvstýrisflokkurin fyri almennum fundi á Landsbókasavninum, har fundarfólkið viðgjørdi nýggju sjálvstýristilgongdina, sum nú fyriliggur.

Helena Dam á Neystabø legði fyri við at greiða frá tí nýggja uppskotinum, sum skal leggjast fyri tingið í næstum.

Landsstýriskvinnan hjá Sjálvstýrisflokkinum heldur, at hetta nýggja uppskotið kundi ikki ligið nærri røttum sjálvstýrispolitikki, sum hon málber seg. Hon sigur, at tað er heilt einfalt genialt við tveimum fólkaatkvøðum, tí á henda hátt verður gongdin fram ímóti sjálvstýrinum líðandi, og fólk hava tvær ferðir møguleika at greiða atkvøðu í hesum spurninginum.

### Javnaðarflokkurin hopar undan

Landsstýriskvinnan greiddi frá, at samgongan gjørdi fleiri royndir at fáa Javnaðarflokkin at taka undir við ætlanini, og at Jóannes Eidesgaard segði á fundi fyri stuttum, at Javnaðarflokkurin kundi taka undir við fyrsta partinum av ætlanini, men at hann síðani dróg í land aftur. Soleiðis hevur Javnaðarflokkurin hopað undan í teimum semingsroyndum, samgongan hevur roynt at fingið í lag.

Helena Dam á Neystabø metti, at frá hennara síðu var eingin beinleiðis forðing fyri, at fáa Javnaðarflokkin uppí semjuna, men tað hevði verið trupult at fingið Tjóðveldisflokkin at taka undir við einum uppskoti, sum Javnaðarflokkurin eisini kann góðtaka. Soleiðis stóð valið millum


*Helena Dam á Neystabø sigur, at Javnaðarflokkurin hevur hopað undan, tá samgongan hevur roynt at nærkast størsta andstøðuflokkinum*

Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin.

Formaður Sjálvstýrisfloksins helt fram við at greiða frá, at tað var sera langt millum flokkarnar í samgonguni, tá hetta nýggja uppskotið skuldi orðast. Tað kravdi tí nógva orku og tíð at skrúva eitt uppskot saman, sum var nóg hóvligt, at allir kundu taka undir við tí.

### Skeivt við fólkaatkvøðu

Millum fundarfólkið á Landsbókasavninum var eisini Hilmar Kass, fyrrverandi løgtingsmaður hjá Sjálvstýrisflokkinum. Hann var ósamdur við Helenu og metti ikki, at Sjálvstýrisflokkurin hevði ført rættan politikk í hesum valskeiðnum.

Hann vísti á, at ístaðin fyri at samráðast við danir um ein endaligan sáttmála, so skuldi samgongan heldur havt arbeitt meira miðvíst við yvirtøkum av málsøkjum.

Eingin forðing er fyri at yvirtaka málsøki so hvørt, men undir samráðingum hava danir møguleikan at leggja seg tvørar. Og við hesi fólkaatkvøðuni hevur samgongan givið dønum sera góð kort í hondina, sum teir annars ikki høvdu havt, um arbeitt hevði verið við yvirtøkum ístaðin.

Hann helt tískil, at samgongan var farin skeivt fram á sjálvstýrisleið, tí hon skuldi heldur havt lagt størri dent á yvirtøkur í hesum valskeiðnum, og síðani arbeitt víðari, um hon varð afturvald.

Helena vardi seg við, at henda samgongan hevði ikki havt tað sum mál at fremja yvirtøkur, men heldur vildi hava ein nýggjan sáttmála við danir um ríkisrættarligu viðurskiftini, og tí vóru málsøki ikki yvirtikin í hesum valskeiðnum.

– Eingin kann siga nakað um árið 2012, og kanska hava fólk eina heilt aðra støðu, tá tann dagurin upprennur. Vit vóru ikki beinleiðis fyri tí seinnu fólkaatkvøðuni, men vit vildu ikki seta hart ímóti hørðum í tí málinum, sigur Helena Dam á Neystabø, formaður Sjálvstýrisfloksins.

Helena Dam á Neystabø legði afturat, at høvuðsorsøkin til, at eingin samráðingarloysn fekst við danir, var ynski føroyinga um størri sjálvstýri. Hetta kundi danska stjórnin ikki góðtaka, tí Danmark skal hava yvirvágina í ríkisfelagsskapinum.

Formaðurin mælti annars til, at vit líta á egnan rætt og egin evni við komandi fólkaatkvøðu, og tí skulu fólk fara á val og atkvøða »ja« tann 26. mai.

# Semja um kósina hjá stjórnini

**Breið semja er i Fólkatinginum um útspælið frá stjórnini, sum bjóðar landsstýrinum blokkstuðul í fýra ár, um nýggja sjálvsstýrisætlanin vinnur undirtøku 26. mai**

FRAMTÍÐARSTØÐA FØROYA
*Magnus Dam, Keypmannahavn*



Á Christiansborg eru flestu flokkar á einum máli um, at landsstýrið hevur tikið eitt heldur víðgongt stig við sínari nýggju ætlan. Tá ið Nyrup var á fundi við Føroya-nevndina á middegi týsdagin, fekk forsætisráðharrin samstundis breiðan stuðul fyri sínum boðum til landsstýrið um, at skiftistíðin verður fýra ár, um føroyingar atkvøða ja 26. mai

Formaðurin í Vinstra, Anders Fogh Rasmussen, segði eftir fundin, at landsstýrið roynir at læsa støðuna fasta við sínum uppskotið.

– Føroyingar skulu atkvøða um føroyska sjónarmiðið, sum er loysing og blokkstuðul í 12 ár. Í einari slíkari støðu kunnu vit í Fólkatinginum bara gera eitt, og tað er so at atkvøða um okkara sjónarmið. Og tað er: »Loysing? Ja, um tykkum lystir. Men so fáa tit bara blokkstuðul í fýra ár«, segði Anders Fogh Rasmussen við Ritzau eftir fundin í Føroya-nevndini.

Formaðurin í Vinstra heldur ikki, at danir tveita føroyingar út úr Ríkisfelagsskapinum við hesum boðunum, tí tað er landsstýrið, sum hevur til endamáls at loysa frá Danmark.

### Ovfarin

– Eg var ovfarin av at landsstýrið valdi hendan framferðarháttin. Tað vanliga vildi verðið at samráðst um eina loysn við stjórnina. Og so verður hendan loysnin koyrd út til fólkaatkvøðu. Nú kemur atkvøðugreiðslan at snúgva seg um sjónarmiðið hjá øðrum partinum. Tað er ein ógvuliga serstakur samráðingarháttur og ein roynd at »skjóta« seg til eitt úrslit, sum ikki kundi røkkast við samráðingum, sigur Anders Fogh Rasmussen.

SF styðjar somuleiðis støðuna hjá stjórnini um at minka blokkstuðulin eftir fýra árum, men flokkurin ávarar ímóti at fara ov harðliga fram ella gera viðurskiftini millum londini spentari.

– Tað eru føroyingar, sum avgera hendan spurningin. Um teir førka seg móti sjálvstýri, so skal blokkurin minkast eftir fýra árum. Men vit halda tað eisini vera týdningarmikið, at hetta ikki endar við ov nógvum »kanónbátsdiplomatii« ella kolonivaldi, sigur Jes Lunde, formaður í tingbólkinum hjá SF.

Áður hevur Peter Duetoft úr CD, sum er formaður í Føroya-nevndini, greitt víst ætlanini hjá landsstýrinum frá sær og undirstrika, at talan verður um 3-4 ára skiftistíð við hesari ætlanini.

### Skaðar viðurskiftini

Tann einasti, sum heldur, at stjórnin kanska fer í so harðliga fram, er Jan Sjursen, formaður í Kristiliga Fólkaflokkinum. Hann heldur, at stjórnin átti at bíða við sínum útspæli, inntil fólkaatkvøðan í Føroyum hevur verið. Partarnir skulu kortini samráðast eftir fólkaatkvøðuna, vísir hann á.

– Tað er óheppið fyri Ríkisfelagsskapin, at stjórnin nú eisini kennir seg noydda til at »krita vøllin«, sigur Jann Sjursen.



Nýggjar samráðingar við danir:

# Fólkaatkvøðan skal styrkja støðuna


*Fókaatkvøðan, sum varð almannakunngjørd í Tinganesi 1. februar, hevur til endamáls at styrkja landsstýið í nýggjum samráðingum við donsku stjórnina um fullveldi*

**Eitt ja á fólkaatkvøðuni í mai skal brúkast til at fáa tólv ára skiftistíð frá dønum. Hóast Nyrup heldur fast um, at skiftistíðin verður fýra ár, fer atkvøðan at snúgva seg um tólv ár. Hetta fyri at styrkja eina nýggja føroyska samráðingastøðu við fólkinum í rygginum**

FÓLKAATKVØÐAN
*John Johannessen*

Fólkaatkvøðan í mai skal brúkast til at styrkja eina føroyska samráðingarstøðu í nýggjum samráðingum við danir.

Hetta viðurkennir Anfinn Kallsberg, løgmaður, fyri Sosialinum.

– Vit vilja vísa Nyrup, at føroyska fólkið ynskir at minka blokkin og yvirtaka málsøki eftir tólv árum, sum landsstýrið hevur skotið upp. Vit skulu vísa danska forsætisráðharranum, at vit hava gjørt eina ætlan, sum er kjølfest í fólksins vilja, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður sigur seg vænta eitt ja á fólkaatkvøðuni í mai. Og við hesum úrsliti í rygginum ætlar løgmaður sær í holt við nýggjar samráðingar við donsku stjórnina.

Løgmaður vísir á, at tað, sum landsstýrið leggur upp til, er, at løgtingið samtykkir eina gongd á 12 ár í einari løgtingslóg, sum síðani verður staðfest við einari fólkaatkvøðu. Í hesari løgtingssamtykt verður sagt, at málsøkini, sum vit eftir heimastýrislógini kunnu yvirtaka, verða yvirtikin næstu tólv árini. Í sama tíðarskeiði skal eisini fíggjarligi parturin, sum er tengdur at málsøkjunum eisini flytast til føroyingar at gjalda.

– Hetta vil siga, at vit taka á okkum fulla ábyrgd, bæði av málsøkjunum og av rakstrinum av teimum, ger løgmaður greitt.

Løgmaður ásannar, at hóast føroyingar á fólkaatkvøðuni í mai samtykkja, at tíðarskeiðið skal vera 12 ár, er neyðugt við samráðingum við danir um hetta.

– Sjálvsagt skulu samráðingar til. Tí vit hava ein mótpart, sum eitur danska stjórnin. Men tað er ikki danska stjórinin, sum avger, hvat Føroya fólk atkvøður um á einari fólkaatkvøðu, staðfestir løgmaður.

### Vísa á fólkaviljan

Eftir fund við Føroyanevndina hjá Fólkatinginum týsdagin gjørdi danski forsætisráðharrin greitt, at danska stjórnin fatar fólkaatkvøðuna í mai sum eina fólkaatkvøðu um loysing. Stjórin heldur í veruleikanum, at nýggja ætlanin hjá landsstýrinum ikki liggur so langt frá upprunaligu fullveldisætlanini, sum landsstýrið vil vera við.

Tí eru greiðu boðini frá danska forsætisráðharranum, at blokkstuðulin er burtur um fýra ár, um føroyingar atkvøða ja á fólkaatkvøðuni í mai.

Hesi boð fatar løgmaður sum eina hóttan frá dønum, fyri at fáa føroyingar at atkvøða nei.

Men samstundis ásannar løgmaður, at tað eru danir, sum í seinasta enda gera av, hvussu leingi vit fáa blokkstuðul. Annars kundi landsstýrið bara spurt føroyska fólkið á fólkaatkvøðu, um tey ynsktu blokkin at halda fram í 100 ár.

Orsøkin til, at landsstýrið vil hava Føroya fólk at atkvøða, um tey ynskja blokkin minkaðan burt eftir tólv árum, er rætt og slætt fyri at staðfesta fyri danska forsætisráðharranum, at føroyska fólkið stendur aftan fyri ætlan landsstýrisins, so landsstýrið kann fáa stjórnina at ganga við uppá ætlanina hjá landsstýrinum, viðurkennir løgmaður.

### Nýggj fólkaatkvøða

Eftir fólkaatkvøðuna, skal landsstýrið aftur til samráðingarborðið saman við dønum. Verður úrslitið ja á fólkaatkvøðuni, hevur landsstýrið eitt føroyskt fólkakrav um 12 ára skiftistíð við sum barlast.

Men tað kann hugsast, at danska stjórnin kortini ikki gongur við uppá 12 ár. Ger hon ikki tað og úrslitið í staðin verður til dømis 7 ár, skulu føroyingar sambært løgmanni aftur til fólkaatkvøðu.

– Er tað fyrst samtykt á eini fólkaatkvøðu, at skiftistíðin skal vera 12 ár, mugu vit eftir mínum tykki aftur til eina nýggja fólkaatkvøðu, um úrslitið verður nakað annað, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Verður úrslitið av eini fólkaatkvøðu, sum snýr seg um til dømis sjey ára skiftistíð eitt nei, standa vit aftur í somu støðu, sum í dag, viðurkennir løgmaður.

# Lánini dýrari

**Løgtingið feldi týsdagin uppskotið um at varðveita rentustuðulin á 48 prosentum. Stuðulin fer í ár niður á Bert andstøðan, sum átti uppskotið, tók undir við uppskotinum.**

RENTUSTUÐUL
*Magnus Dam*

Tey, sum hava sethúsa-, lestrar- og onnur lán mugu eitt sindur djúpari niður í lumman eftir pengum í ár og komandi ár. Rentustuðulin verður í ár lækkaður úr 48 niður í 44 prosent, og tvey tey komandi árini lækkar stuðulin enn meira.

Hetta er greitt, eftir at ein meiriluti í løgtinginum feldi uppskotið frá andstøðuni um at varðveita rentustuðulin á 48 prosentum. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin áttu uppskotið, og tá ið tað var til fyrstu viðgerð vóru ávís tekin um, at uppskotið kanska fór at verða samtykt í løgtinginum. Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum tosaði eitt nú fyri uppskotinum, men undir viðgerðini í Fíggjarnevndini gjørdist greitt, at Fólkaflokkurin ikki fór at taka undir við uppskotinum kortini. Somu støðu høvdu hinir báðir samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum mæltu frá at samtykkja uppskotið.

Undir aðru viðgerð týsdagin stóðu samgonguflokkarnir sum ein maður, og hóast nógvar atfinningar frá andstøðuni móti serliga Fólkaflokkinum, so stóð hann ikki til at vika.

Samgongutingmenn vístu á, at talan er um eina lítla lækking, sum ikki fer at merkjast so væl hjá teimum, sum ikki hava risastór lán, og harafturat vístu tingmenn á, at ætlanin alla tíðina hevur verið, at stuðulin skal lækka aftur. Rentustuðulin var eitt krepputiltak, og í lógini var ásett, at hann skuldi lækka, tá nøkur ár eru fráliðin.

Tá ið tingmenn atkvøddu, atkvøddu 12 tingmenn fyri uppskotinum og 14 ímóti. Uppskotið datt sostatt burtur.

Sambært lógini um rentustuðul fer stuðulin í ár niður á 44 prosent, næsta ár fer hann niður á 42 prosent, og í 2003 lækkar stuðulin niður í 40 prosent av rentuútreiðslunum.